

# BIRGAR HELDUR SKIL Á VEÐRINUM

– TAÐ IRRITERAÐI MEG, TÁ FÓLK SØGDU, AT TAÐ **ALTÍÐ REGNAR**. EG VISTI VÆL, AT SOLEIÐIS ER TAÐ BARA IKKI, MEN EG HEVÐI EINGI TØL AT VÍSA Á. EFTIR AT EG BYRJAÐI AT SKRIVA NIÐUR Í FEBRUAR 2008, GJØRDIST EG **RÆTTILIGA BITIN** AV HESUM. SUM TÍÐIN GONGUR, **SKRÁSETINGARNAR** ERU VORÐNAR FLEIRI, OG TIL BER AT GERA SAMANBERINGAR, ER HETTA BARA VORÐIÐ MEIRI OG MEIRI ÁHUGAVERT OG SPENNANDI, SIGUR **BIRGAR JOHANNESEN**



**SAMRØÐA**
**Vilmund Jacobsen**
vilmund@sosialurin.fo

Birgar Johannesen, sum føroyingar kenna frá bókaútgávum og tónleikasendingum í Kringvarpi Føroya, hevur heilt síðan í februar mánaði 2008 skrásett, hvussu veðurlagið í høvuðsstaðnum háttar sær. Alla hesa tíð og hvønn einasta dag frá klokkan 08 á morgni til midnátt hevur hann gingið við blokki uppi á sær og hevur fest á blað, tá broytingar eru í veðurlagnum við denti á avfall.

– Alla hesa tíð havi eg skrivað niður, tá broytingar eru í veðurlagnum, tíma fyri tíma, og síðan telji eg saman mánaða fyri mánaða, fjórðingsár fyri fjórðingsár – og ár fyri ár.

Birgar sigur, at hann hevur fylgt sera neyvt við veðrinum, síðan hann byrjaði, og tí eru hansara skrásetingar eisini rættiliga eftirfarandi. – Men tað ber ikki til at skráseta alt manuelt. Skal alt, sum hendur í veðurlagnum, takast við, mugu onnur tól upp í leikin.

> ... vit hava havt 136 turrari dagtímar í fyrsta fjórðingsári 2010 enn um somu tíð í 2009...

Hann vísir á, at hann í sínari skráseting serliga hevur heft seg við, um tað er avfall ella turt veður, og hvat avfall talan er um.

– Tað er ógjørligt neyvt at skráseta manuelt, hvussu nógvar sóltímar vit hava, sum dagarnir ganga. Men eg geri mær eisini notatir um, hvørt tað er klárt, yvirskýggjað, tám ella mjørki, leggur Birgar Johannesen aftrat.

## TURRARI Í 2010

Sum nevnt í byrjanini av hesi grein, fór Birgar Johannesen undir at skráseta avfall í Havn longu í februar í 2008. Í einum yvirliti, sum hann hevur gjørt yvir fyrsta fjórðingsár í 2008, 2009 og 2010, sæst, at í fyrsta fjórðingsári 2010 eru 136 dagtímar fleiri turrir enn í fyrsta fjórðingsári 2009.

Við tað, at Birgar ikki hevur januar mánaða í 2008 við, er ikki rætt at samanbera fyrsta fjórðingsár hetta árið við hini bæði seinnu, 2009 og 2010.

Vit kunnu tó taka høvuðstølini við, sum hann í hesum yvirliti hevur skrásett:

**Februar/2008:** Turt í 312 tímar/ avfall í 152 tímar.
**Mars/2008:** Turt í 380 tímar/ avfall í 116 tímar.
**Januar/2009:** Turt í 361 tímar/ avfall í 135 tímar.
**Februar/2009:** Turt í 301 tímar/ avfall í 147 tímar.
**Mars/2009:** Turt í 376 tímar/ avfall í 120 tímar.
**Januar/2010:** Turt í 398 tímar/ avfall í 98 tímar.
**Februar/2010:** Turt í 390 tímar/ avfall í 58 tímar.
**Mars/2010:** Turt í 386 tímar/ avfall í 110 tímar.

Birgar Johannesen hevur eisini gjørt eina samanteljing sum vísir, at í januar, februar og mars í 2009 vóru tilsamans 1038 tímar uttan avfall – og 402 tímar við avfalli.

Taka vit so fyrsta fjórðingsár í ár – 2010 – vóru samanlagt 1174 tímar við ongum avfalli – og 266 tímar við avfalli.

– Hetta merkir, sum eg nevndi, at vit hava havt 136 turrari dagtímar í fyrsta fjórðingsári 2010 enn um somu tíð í 2009, sigur havnamaðurin, sum nú á triðja ári neyvt skrásetir avfall og veðurlag í høvuðsstaðnum.

### Grenj um veðurlag

Men hvat var tað so, sum fekk havnarmannin við mammu av Signabø og pápa úr Havn at brúka so nógva tíð upp á at skráseta føroyska veðurlagið?

– Tað irriteraði meg, tá fólk søgdu, at tað altíð regnar. Eg visti væl, at soleiðis er tað bara ikki, men eg hevði eingi tøl at vísa á. Eftir at eg byrjaði at skriva niður í februar 2008, gjørdist eg rættiliga bitin av hesum. Sum tíðin gongur, skrásetingarnar eru vorðnar fleiri, og til ber at gera samanberingar, er hetta bara vorðið meiri og meiri áhugavert og spennandi.

Birgar Johannesen heldur, at fólk eru nøkur stór grenj, tá ræður um veður og avfall.

– Vanligt er at hoyra fólk siga, at tað regnar altíð í Føroyum, men tað passar slett ikki. Tað er turt tað mesta av tíðini. Fyri summi virkar tað soleiðis, at kemur eitt grovt æl, so er dagurin oyðilagdur – tí tað bara regnar og regnar, halda tey.

Spurdur, hvaðani hann heldur, at føroyingar munnu hava tað, at vit brúka so nógva tíð upp á at tosa um veðrið, sigur hann, at hetta hava vit helst fingið inn við móðurmjólkini, sum hann tekur til.

– Tað eru tveir bólkar, tú avgjørt